52-084/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 84/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um avgerðirnar um, hvat hendir við landamørkini í Føroyum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør heldur løgmaður skal hava avgerðarrættin um, hvat fer fram við landamørkini í Føroyum, og hvørji krøv kunnu setast til tey, sum koma til Føroya – danskir myndugleikar ella føroyskir myndugleikar?

2. Ætlar løgmaður at gera nakað við málið?

Svar:

Til spurning 1

Spurningurin má liðast sundur í trý. Ein liður snýr seg um marknaeftirlit við útlendingum sum koma til landið. Ein liður snýr seg um at seta í verk tiltøk við markið til Føroya vegna smittuvanda, sum stendst av fólki, fæi ella vørum sum koma til landið. Ein triði liður snýr seg um eftirlitið við inn- og útflutningi av vørum og tænastum.

Marknaeftirlit er málsøki sum ikki er yvirtikið sbr. ræðislógini § 1 stk. 2, nr. 22. Málsøkið verður í høvuðsheitum fyrisitið av Udlændinge- og Integrationsministeriet, Udlændingestyrelsen og løgregluni eftir reglunum í anordning. nr. 182 af 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven við seinni broytingum. Undir seinastu samgongu vórðu royndir gjørdar at yvirtaka økið, men hesar steðgaðu upp, tí at tað fekst ikki í lag ein avtala við Schengen myndugleikarnar um at føroyskir myndugleikar fingu heimild í mun til Schengen. Sitandi samgonga hevur ikki á skrá yvirtøku av útlendingaøki og marknaeftirliti.

Farsóttarmálsøkið er ikki yvirtikið. Hetta merkir, at tað eru ríkismyndugleikarnir, sum lóggeva á hesum økinum í Føroyum, seinast við anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme. Tað er soleiðis Landslæknin og Farsóttarnevndin, ið útinna lóggávuheimildirnar. Í Farsóttarnevndini sita fútin, landslæknin, landsdjóralæknin, stjórin á Gjaldstovuni, stjórin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sum føddir limir, meðan landsstýrið velur tríggjar limir afturat hesum.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Eftir lógini hevur Farsóttarnevndin víðfevndar heimildir at seta ymisk tiltøk í verk ímóti fólki, sum koma til landið, eitt nú testing og avbyrging. Landsstýrið er farið undir eina tilgongd við at fyrireika eina yvirtøku av farsóttarmálsøkinum.

Tá ið umræður eftirlit við smittandi sjúkum hjá djórum, er málsøkið yvirtikið og landsstýrið og landsdjóralæknin kunnu, í samband við innflutning, seta í verk tiltøk sbr. løgtingslóg nr. 16 frá 23.02.2001 um djórasjúkur (um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum)

Málsøkið eftirlit við inn- og útfluttningi av vørum og tænastum varð yvirtikið við løgtingssamtykt 15. desember 1948. Skipanin av hesum øki fer serliga fram í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll. TAKS tekur sær av hesum.

Til spurning 2

Landsstýrið er farið undir eina tilgongd við at fyrireika eina yvirtøku av farsóttarmálsøkinum.

Í Tinganesi, 18. november 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður